| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 11. desember 2008 |
| Býráðsfundur nr. | 11/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2008 tann 11. desember kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 05. desember 2008 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig
Gordon M. petersen
Petur Abrahamsen

Gordon M. Petersen møtti fyri Eyðun á Lakjuni, sum boðað hevur borgarstjóranum frá, at hann ikki hevur umstøður at møta á fundinum av ávísum givnum orsøkum (næmingakonsert).

Signar á Brúnni hevur telefoniskt ídag boðað borgarstjóranum frá, at hann ikki møtir á fundinum, grundað á fund í skúlastýrisfund í Klaksvík.

Tórfríður Abrahamsen hevur ídag boðað umsitingini frá, at hann uttan grundgevingar ikki møtir á býráðsfundinum.

Jón Nolsøe Olsen møtti ikki á fundinum og hevði ikki givið borgarstjóranum avboð, hóast ásetingar eru galdandi um hesi viðurskifti.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Meðan má nr. 58/2008 varð viðgjørt luttók Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari á fundinum.

**Mál nr. 58/2008.**

Góðkenning av nýggjum uppskoti til fíggjarætlan kommununar fyri 2009, sum lagað er til eftir nýggju roknskaparskipanini, sum Fíggjarmálaráðið hevur sett í gildi fyri føroysku kommunurnar tann 01. januar 2009.

Grundgevingin fyri viðgerðini er, at uppskotið, sum Fíggjarmálaráðið saman við fíggjarleiðaranum hevur laga til góðkendu fíggjarætlanina fyri kommununa fyri 2009, sum samtykt varð á býráðsfundi tann 27. november 2008, formliga krevur góðkenning býráðsins.

Tó skal fíggjarætlanin ikki verða viðgjørd av nýggjum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna fíggjarætlanina fyri kommununa fyri 2009, sum uppsett og tillagað er sambært Kapitul 3, § 3, stk. 1 og § 5, stk. 1 í kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununar. (6-0).

**Mál nr. 59/2008.**

**Viðvíkjandi parkeringsøkinum á matr. nr. 871k á Kambsdali.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Eyðfinni Jacobsen, dagfest 14. oktober 2008 um at keypa matr. nr. 871k á Kambsdali til grundstykki til at byggja sethús á. Ætlanin er at byggja 1 plans hús upp á umleið 120 fermetrar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 23. oktober 2008, og mælir nevndin býráðnum til at broyta byggisamtyktina, so matr. nr. 871k verður sethúsaøki.

Grundgevingin er, at annað økið má verða gjørt til parkeringspláss, tá ið nýggjur barnagarður verður bygdur á Kambsdali.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (6-0)

**Mál nr. 60/2008.**

**Àsetan av fundardøgum býráðsins fyri 2009.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum, dagfest 05. desember 2008, har hann mælir til, at almennu býráðsfundirnir fyri 2009, sum eru 11 í tali, verða hildnir niðanfyri standandi hósdagar kl. 16.30 í býráðssalinum:

*29. januar, 26. februar, 26. mars, 23. apríl, 28. mei, 25. juni, 27. august, 24. september, 29. oktober, 26. november og 10. desember.*

**Avgerð:**
Uppskot borgarsjórans varð samtykt. (6-0).

**<u>Mál nr. 61/2008.</u>**

**Ískoyti til leigusáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og P/F Havsbrún fyri matr. nr. 239f á havnarøkinum**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 18. juni 2002 undirskrivað nýggjan leigusáttmála við P/F Havsbrún fyri matr. nr. 239f á havnarøkinum, sum er lendi undir "Pelagos", somuleiðis sum ískoyti til henda er undirskrivað og góðtikið av býráðnum tann 06. november 2008. Uppruna leigusáttmálin, dagfestur 06. februar 1979 við seinni ískoytum fór við nýggja tessvegna úr gildi.

Sambært § 1 í galdandi leigusáttmála, dagfestur 18. juni 2008 tók leigumálið við tann 01. apríl 2002 og stendur við óuppsigiligt í 12 ár fram til 31. mars 2014, og kann innan fyri eitt ár eftir henda dag verða uppsagt av báðum pørtum.

Við skrivi frá P/F Havsbrún til kommununa, dagfest 09. desember 2008 verður boðað frá, at áheitan er komin frá FIH Erhvervsbank A/S um at fáa leigusáttmálan fyri matr. nr. 239f longdan til í minsta lagi 30. Juni 2017.

**Avgerð:**
Samtykt varð at broyta § 1 í leigusáttmálanum partanna millum fyri matr. nr. 239f (Pelagos) soleiðis, at leigumálið verður longt frá 01. apríl 2014 til 30. juni 2017. (6-0)

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.50.

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Elisabeth D. Eldevig

Gordon M. Petersen

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen